# Verða dansispølini fyri endurburði?

**Í TJALDRI nr. 42 eru forvitnisligar greinar um dansispøl, samkynd og Heimastýrislógina**

*Hanus Kamban*

Tað nýggjasta nummarið av TJALDRI, tíðarritinum hjá tí týsk-føroyska vinafelagnum, kom út í juni, men var ikki undirritaða í hendi fyrr enn í september. Men seinur gestur er eisini vælkomin. Tað serliga og virðismikla, sum blaðstjórnin á hesum tíðarriti ger, er at hava eyguni eftir útlendskum tilfari um Føroyar, gomlum sum nýggjum, velja tað besta burturúr og almannakunngera tað, við frágreiðingum og viðmerkingum.




*Týska tíðarritið »Tjaldur« hevur eyguni eftir útlendskum tilfari um Føroyar*

### Heimastýrislógin ikki tað ringasta

Detlef Wildraut, ritstjóri, hevur í eini dupultgrein viðgjørt Føroya politisku søgu frá fólkaatkvøðuni í 1946 til Heimastýrislógina í 1948. Teimum, sum hava lisið verk eftir m.a. Kirsten Harder, Annfinn í Skála, Frederik Harhoff og H.A. Sølvará, er hetta tilfar ikki nýtt, men ein samandráttur av hesum slag er hentur hjá útlendskum lesarum. Wildraut kennir seg ikki sannførdan av tesunum hjá Høgna Hoydal, sum verða framførdar í bókini *Myten om rigsfællesskabet*, og hann dylur ikki fyri, at skipanin við heimastýri, so ilt orð hon hevur fingið á seg, var ein rættiliga skilagóð skipan.

Mangt rennur einum í huga í hesum sambandi. Sjálvsagt ber til at siga, at húsagangurin í 1992 tók grundarlagið undan tí lóg, Føroyar hava virkað eftir frá 1948. Men siga vit tað, slepst neyvan undan at staðfesta, at húsagangurin í Íslandi í fjør tók støðið undan landsins loysingarskipan. Veruleikin er helst, at einhvør ber sum hann roynist. Heimastýrislógin riggar, men bara við ábyrgdarkenslu og røkjuskapi. Fólkafloksins serliga búskaparfatan, sum helst er tann størsta einstaka forðingin fyri einum føroyskum fullveldi, rekur okkum nú ár fyri ár nærri einum nýggjum svørtum oktoberi. Eg meini tað.

### Føroyar og tey samkyndu

Ikki minni áhugaverd er grein eftir Ebbe Volquardsen, har greitt verður frá viðurskiftunum hjá samkyndum í Føroyum, hugburðinum hjá føringum til henda minniluta og tí stríði, sum fyri fáum árum síðani stóð um ta lógarbroyting, sum hevur bøtt munandi um korini hjá honum. Greinin hevur ein akademiskan dám og víst verður til vísindalig ástøði og vísindaligar frágreiðingar um, hví føringar sum heild hava meira ímóti samkyndum enn fólk aðrastaðni í Norðurlondum. Sum dømi kann verða nevnt, at tann føroyski ungdómsgranskarin Firouz Gaini skilir millum tveir bólkar, tann urbana ungdómin, sum er opin og vísir tolsemi, og tann atlandska neytadrongin, hvørs kallmanshugburður ger, at hann er festur í somu fortíð, sum garpar av sama slag í tilfatturskomnum arabiskum mentanum. Spurningurin er so, hvør verður við yvirlutan, verðinsmaðurin ella bygdafrellið.

### Føroysk dansispøl

Men høvuðsgreinin í hesum blað viðger eitt evni úr føroyskari fólkamentan. Doktararitgerðin um føroysk dansispøl, sum Andrea Susanne Opielka hevur greitt úr hondum, kom í ár út í bók, sum fatar um heilar 468 síður. Í grein síni í TJALDRI hevur Opielka tikið fram teir mest týðandi tættirnar í síni ritgerð. Hvørji hava granskað hetta evni, og hvørjar eru okkara keldur til kunnleika um tað? Nær eru dansispølini komin? Hvørji vóru tey, og hvussu vórðu tey dansað? Í hvørji vídd er talan um dans, og í hvønn mun um spæl? Hvat er upprunin til hesa mentan? Hvønn leiklut hevur hon havt í tí føroyska bóndasamfelagnum?

Hesar og aðrar spurningar viðger Opielka í síni grein. Spurningurin er so, um føringar, sum nú á døgum at kalla bara kenna Ríða Ediling og einar tveir slíkar dansir aftrat, kanska fara at taka hini dansispølini uppaftur.

Av øðrum tilfari kann verða nevnt, umframt ummælir, umrøður og ta alla tíðina dagførdu bibliografiina, samrøða sum Anna V. Ellingsgaard hevði við Jóhan Hendrik W. Poulsen, tá hann fylti 75, og ummæli eftir Detlef Wildraut av *Orðabókini*, sum forlagið Sprotin tá gav út. Hetta nummarið av TJALDRI er 132 síður.

# Sólrún Michelsen við nýggjum yrkingasavni

TÍÐINDASKRIV

Sólrún Michelsen hevur í skjótt mong ár gjørt vart við seg sum høvundur av barnabókum og av tí fínu ”Tema við slankum”, sum nú eisini er ávegis á donskum. ”í opnu hurðini” er hennara fyrsta yrkingasavn og merkt av sama nærlagni og gløggskygni , sum tær undanfarnu bøkurnar. Inngangsyrkingin er ein klassisk sonett við tilsipingum til eldri føroyskan skaldskap, har høvundurin sigur, at hóast reynið rodnar, so vil hon heldur líta í ein eystan, har alt byrjar.

Savnið er fylt við vøkrum yrkingum, sum um somu tíð nerta við tann álvarsliga partin av tilveruni, men eisini við alt tað, sum fyllir ein við gleði. Føroyskur skaldskapur hevur fingið ein nýggjan fullbornan lyrikara, verður sagt í skrivi frá forlagnum

Tað er Mentanargrunnur Studentafelagsins, sum gevur savnið út.



*Rithøvundurin Sólrún Michelsen gevur nú út sítt fyrsta yrkingasavn*

# Tóroddur vitjar deyðan vinmann

**Í nýggjum yrkingasavni vitjar Tóroddur Poulsen deyðan vinmann á Kirkjugarðinum og ivast í, um hann sjálvur er á lívi, bara tí hann veit, at hann ikki er deyður.**

SAVN

*Anna V. Ellingsgaard*
*anna@sosialurin.fo*

Í savninum, sum hevur heitið »Útsýni«, sigur yrkjarin seg altíð hava havt gott útsýni yvir fjørðin, um hann hevur verið uttanlands ella heima, og hann sigur seg sum heild hava verið nøgdan við tað, hann hevur sæð. Vit eru øll onkursvegna lokaði inni í okkara egnu dreymum og kunnu tí tað sama sættast við hetta. Taða kann gott vera, at heimurin er stórur, men loksins er hann avmarkaður til okkum sjálvi og okkara upplivingar.

Yrkjarin ferðast ímillum Havnina, har hann vitjar vinmenn á kirkjugarðinum og Keypmannahavn, har mangt er, men mest úr Føroyum, tí tað er haðani yrkjarin stavar.

Mold og veðrið verða í heilum umrødd saman við deyðum abba, og yrkjarin ivast ikki í, at hann sjálvur bara er á lívi, tí hann ikki veit, at hann er deyður. Hann veit somuleiðis heldur ikki altíð, um hann svevur ella er vakin ella droymur seg vaknan í svøvni, ella um hann vil vakna. Tað er ikki altíð lætt at gera av, hvat ið er veruleiki og ikki. Men hann hevur lisið eina samrøðu við dóttir Paul McCartney, sum eins og pápin hvørki etur kjøt ella fisk, og tí fær yrkjarin hug at eta fisk, hvørja ferð hann hoyrir eitt lag eftir McCartney.

Tað er Mentunargrunnur Studentafelgsins, sum gevur út yrkingasavnið.



*Sum heild er Tóroddur bara heut væl nøgdur við sítt útsýni ...*